TILTØK

Hebron, Argir
Sunnudagin kl. 10.30: Morgunmøti og samstundis barnaansing. Kl. 11.30: Samvera við drekkamunni. Kl. 12.00: Sunnudagsskúli. Kl. 12.00 verður eisini møti, har Sámal í Skorini av Eiði talar.
www.hebron.fo

Lívdin í Hoyvíkar skúla
Leygarkvøldið kl. 20.30: Ungdómsmøti.
Sunnumorgunin kl. 10.30: Familjumøti har Símin Absalonsen talar um evnið: "Torførir spurningar- Hví Kristindómur?".
Á tilbiðjunarmøtinum kl. 12.00 talar Svenning av Lofti um evnið: "Evangelisering" Barnaansing er fyri børn undir skúlaaldur á báðum møtinum.
Drekkamunnur er millum møtini.
Sunnudagsskúlin er kl. 12.00.
Týskvøldið kl. 20 verður annar partur av "Samkomulív og Samfelag í Lívdini"
www.livdin.fo

Meinigheitin í Hoyvík
uppi á Brekku 3
Í kvøld kl. 20.00: Ungdómsmøti, v/ Peter Tkaczyk.
Sunnudagin ongi tiltøk vegna meinigheitslegu. Mánakvøldið kl. 20.00: Felags bønamøti í Filadelfia, Mikumorgun kl. 07.00: Bøn.

KFUK, Tórshavn
4. Grein: Vit hittast mánadagin kl. 19.30 í KFUK. (Blómubinding).

Missiónshúsið við Landavegin
Hóskvøldið kl. 20.00: Møti.
Sunnudagin kl. 14.00: Sunnudagsskúli í Býlingshúsinum á Norðrasta Horni.
Sunnukvøldið kl. 18.00: Møti í missiónshúsinum v/ Martin Thomsen.

Ebenezer
Hósdag
kl. 10.00: Fyrrapartsløta fyri eldri menn í Sloans húsi
kl. 17.00: Sangvenjing, eldra barnakórið
kl. 20.00: Ungdómsmøti
Fríggjadag
kl. 20.00 Teen-Night
Sunnudag
kl. 10.00 Breyðbróting.
kl. 12.00 Sunnudagsskúli
kl. 18.00 Evangeliskt møti
Øll eru vælkomin.
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

Frelsunarherurin, Tórshavn
Hóskvøldið kl. 20.00: Heimaforbund fyri allar kvinnur.

Meinigheitshúsið
Hóskvøldið kl. 20.00: Ungdómsmøti.
Fríggjakvøldið kl. 19.30-21.30: Juniorhugni, frá 5. flokki.
Leygardagin kl. 16.30: Bønarløta fyri kvinnur.
Sunnudagin kl. 14.00: Sunnudagsskúli.
Sunnudagin kl. 18.00: Møti v/ Klæmint Tausen.

Katólska kirkjan
Hvønn gerandisdag kl. 17.30: Messa í Kerit.
Leygardagin kl. 11.00: Hámessa v/ William Kenney, hjálparbiskupi, Gøteborg, í Mariukirkjuni. Aftan á verður kirkjukaffi.
Eingin sunnudagsskúli.

Filadelfia
Landavegur 22
Í kvøld kl. 19.00: Møti
Fríggjadagin kl. 19.00: Møti.
Leygardagin kl. 10.00-12.30: Møti v/ kaffisteðgi, barnamøti er eisini meðan møti er, kl. 19.00: Møti, barnamøti er eisini meðan møti er, kl. 22.00: Lovangsmøti.
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti, kl. 11.50: Sunnudagsskúli og ABC v/ Alex O´Campo, evni er: "Myndugleiki hins trúgvandi" 2. partur, kl. 18.00: Familjumøti.
Mánadagin kl. 20.00: Bønarskúlin.
Um tær tørvar persónliga samrøðu og/ella forbøn ring 211067. Telefonin svarar man-fri frá 8-16
www.filadelfia.fo

Kirkju- og missiónshúsið
Hóskvøldið 30. sept. kl. 20.00: Bibliutími. Gunnar Reynslá, Argir. Opinb. 12.

Tórshavnar Hvítusunnusamkoma
Yviri við Strond
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti og kl. 18.00: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

Nazaret Kaldbak
Hjúnini Corine og Sørin Joensen, sum fara til Theilands at virka sum trúboðarar, greiða frá og vísa myndir á møtinum 3. oktober. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Missiónshúsið Libanon í Sørvágur
Sjómannskvinnuringurin kemur saman hóskvøldið 30/9 kl. 20.00.
Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.

Vestmanna Missiónshús
Vikuskiftismøtir byrja í kvøld kl. 20.00 við Hans Eiler Hammer, Gulaki og Jónhildu Hansen, Magna Christiansen o.ø.

Saron Vestmanna
Evangeliskt møti verður sunnudagin kl. 18.00.
Verið hjartaliga vælkomin í Saron.

Meinigheitshúsið á Skála
Í kvøld kl. 20.00: Møti við Jørgen Bernard frá Kirkjuliga Missiónsfelagnum. Innsavning. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Elim, Søldarfjørður
Sunnudagin kl. 12.00: Breyðbróting og sunnudagsskúli.
Sunnudagin kl. 18.00: Møti við vitnisburðum.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

Lívsins Orð, Runavík
Sunnudagin kl.17.00 verður evangeliskt møti.
Mánakvøldið kl. 20.00 møtir ungdómsbólkurin.

Keldan í Skálafirði
Leygarkvøldið kl. 21.00: AWAKE við Arna Abrahamsen.
Sunnudagin kl. 17.00: Møti við Martin Olsen. Barnamøti kl. 17.00.
Vælkomin í Kelduna.
www.keldan.fo

Missiónshúsið í Leirvík
Fríggjakvøldið 1. okt. kl. 19.00: Hugnaløta. Øll eru vælkomin.

Getsemane, Klaksvík
Fríggjakvøldið kl. 20.30: Ungdómsmøti
Sunnudagin kl. 13.30: Sunnudagsskúli,
sunnukvøldið kl. 18.00: Møti.

Soli Deo Gloria
Hóskvøldið kl. 20.00: Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 14.00: Sunnudagsskúli.
Sunnukvøldið kl. 18.00: Møti v/ Olaf og Gvøðbjørg West.

KFUM&K Klaksvík
Hóskvøldið kl. 20.30: Gospelkórið "Gleðið" venur.
Fríggjakvøldið kl. 22.00: Opið hús.
Sunnudagin kl.14.00: Sunnudagsskúli. Kl.17.30: Bønarløta. Kl.18.00: Møti við Hanus Lassen. Kl. 21.00: Ungdómsmøti.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

Missiónshúsið í Skopun
Sunnudagin kl. 14.00: Sunnudagsskúli. Kl. 17.30: Bøn- & lovsangsløta, kl. 18.00: Møti.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

Missiónshúsið á Tvøroyri
Ungdómsmøti verður leygarkvøldið kl. 21.00.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

Frelsunarherurin í Vági
Sunnudagin kl. 14.00: Sunnudagsskúli og sunnukvøldið kl. 18.00: Evangeliskt møti.
Heimaforbundið stendur fyri hesum møtinum. Bønarmøti hálvan tíma undan møtinum.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

Sion, Vágur
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti.
Mánakvøldið kl. 21 Bønarmøti og bønartænasta á tlf. 373777. Tú ert vælkomin at ringja um tær tørvar forbøn.

Evangeliskur fundur í Ålborg
Leygarkvøldið 2. okt. kl. 19.00 verður evangeliskur fundur í Dag Hammerskjolds gade 2, Ålborg. Talarar: Levi Joensen og aðrir. Eftir fundin bjóða vit kaffi. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Samkoman Malta
Vinkelvej 2
Hirtshals
tlf. 98944370

Evangeliskur fundur í Esbjerg
Fríggjakvøldið 8. okt. kl. 19.30 verður evangeliskur fundur í Sædding Center, Sædding, Esbjerg. Talarar: Levi Joensen og aðrir. Eftir fundin bjóða vit kaffi. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Samkoman Malta
Vinkelvej 2
Hirtshals
tlf. 98944370

Silvurbrúdleyp

Týsdagin 19. oktober hava Amanda og Andreas Max Andreasen, Tórshavn, verið gift í 25 ár. Dagurin verður hildin á Hotel Føroyum leygardagin 16. oktober kl. 19. Skyldfólk, vinir og kenningar við vilja gleða silvurparið við at koma, verða biðin um at siga frá á tlf. 316620, 213816 ella til postadr. amanda-a@post.olivant.fo áðrenn leygardagin 2. oktober.

Brúdleyp

Leygardagin 2. oktober giftast Ása í Lambanum, Norðragøtu, og Marjus Hansen, Skálafirði. Døguði verður fyri innbodnum á Muntra, og drekkamuður verður í Bygdarhúsinum í Hósvík frá kl. 19.00, har øll eru vælkomin.

Leygardagin 20. november kl. 16.00 giftast í Vitninum í Hvalba Gunna Dimon og Jón við Neyst, bæði úr Hvalba. Veitslan verður á Hotel Øravík kl. 19.00. Tey, ið ynskja at gleða brúðarparið við at koma í veitslu, verða biðin um at ringja á tlf. 375189 ella 580168 áðrenn 30. oktober.

Armgarð Weihe vann búmerkja kappingina

BÚMERKJAKAPPING
Tíðindaskriv

Kommunusamskipan Føroya

Armgarð Weihe átti besta uppskotið til búmerkjakappingina hjá Kommunusamskipanini

Í summar hevði Kommunusamskipan Føroya, KSF búmerkjakapping, og á stýrisfundi Í farnu viku samtykti stýrið Í KSF einmælt at taka undir við tilmælinum hjá dómsnevndini, ið varð sett at taka støðu til innkomnu uppskotini.

Dómsnevndin mælti til, at Armgarð Weihe skuldi fáa 1. virðisløn. Lýst varð eisini við 2. virðisløn, men dómsnevndin mælti frá at lata hana.

Í dómsnevndini sótu: Øssur Mohr, listamaður úr Fuglafirði, Jan Christiansen, borgarstjóri úr Tórshavn, Petry Joensen, býráðsskrivari í Vági

10 uppskot komu til búmerki frá 8 luttakarum.

Nýggja búmerkið hjá KSF, sum er Í blágráum litum ímyndar lagað malagrót. Hvør steinur er ein eind, sum, settur saman við øðrum steinum, skapar ein bygnað. Laðast kann afturat, og bygnaðurin kann innganga í nýggjar samanhangir. Lagað grót er ímyndin av tí menniskjaskapta. Bygnaðurin er sterkur, men skal haldast við líka. Búmerkið lýsir ta menniskjaligu drívmegina og týdningin av samskifti og samskipan.

Litirnir í búmerkinum eru valdir, so teir stuðla undir og eru í samspæli við formin á búmerkinum. Liturin stavar frá basaltinum, sum er tilfarið, ið landið byggir á, og kann eisini ímynda eina spegling av himmali og havi í grótinum.

Dópur og navnagáva

Fróðskaparsetrið hevur skrivað út ritgerðarkapping, har sóknast verður eftir siðum, sum hava dóp og navngeving at gera

RITGERÐARKAPPING
tíðindaskriv

Sóknast verður eftir lýsingum av siðum í sambandi við at børn verða doypt ella navngivin. Siðir bæði í eldri tíð og okkara tíð hava áhuga. Hvussu nógv tann skrivandi viðger øðrumegin eldri og hinumegin nýggjari siðir, ger tann skrivandi sjálv/ur av. Nýggir siðir og gamlir siðir hava eins stóran áhuga, Millum møguligar spurningar at viðgera kunnu nevnast: Hvussu verður atborið, táið navn verður valt barninum? Uppkallingarsiðir ella ikki? Hvussu gamalt er barnið, táið tað fær navn ella verður doypt? Er navnið loyniligt fram til ta avgerandi løtuna? Hvussu er hátíðarhaldið ella hendingin sjálv? Hvørjir persónar eru týdningarmiklir í hesum sambandi? Hvussu stórur partur av familjuni er við í hesum? Hvussu eru siðirnir í sambandi við (døgurða)veitslu eftir, at barnið er navngivið ella doypt? Aðrir siðir í hesum sambandi?

Tað eru sum so ikki nøkur formlig krøv til ritgerðina, men væntað verður, at fólk greiða frá slíkum, sum tey annaðhvørt sjálvi hava verið við til ella hoyrt onnur, td. foreldur, ommur og abbar greitt frá. Ritgerðirnar vera ikki dømdar eftir skaldsligu dygdunum, men eftir sjálvum innihaldinum, tvs. hvørjum og hvussu tað verður greitt frá teimum ymsu siðunum í sambandi við dóp og navnagávu.

Freistin at lata inn tilfar til kappingina er 15. februar 2005. Fólk eru vælkomin at seta seg í samband við Fróðskaparsetrið, um okkurt er at spyrja um, annaðhvørt skrivliga ella við at ringja. Bústaðurin er: Setursskrivstovan, J. C. Svabos gøta 14, tlf. 35 25 00. Eisini ber til at senda teldubræv á setur@setur.fo

Ein dómsnevnd verður sett at meta um innkomna tilfarið og virðisløsnir verða latnar fyri bestu úrslitini.

Fróðskaparsetrið hevur tey seinastu fleiri enn 30 árini skipað fyri ritgerðakappingum. Seinasta kappingin var um »skiftissiðir í sambandi við at gentur og dreingir gerast vaksin«. Inn komu 3 handrit, og fingu høvundarnir bókagávu frá Fróðskaparsetrinum sum takk fyri luttøkuna.

TILTØK

Evangeliskur fundur í Sønderborg
Leygarkvøldið 9. okt. kl. 19.00 verður evangeliskur fundur í Skolehjemmet, Sønder Landevej 28, Sønderborg. Talarar: Levi Joensen og aðrir. Eftir fundin bjóða vit kaffi. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Sunnumorgunin 10. okt. kl. 10.00: Breyðbróting, á sama stað.
Samkoman Malta
Vinkelvej 2
Hirtshals
tlf. 98944370

Evangeliskur fundur í Vejle
Sunnudagin 10. okt. kl. 17.00 verður evangeliskur fundur í Staldgårdsgade 4 í Vejle. Talarar: Levi Joensen og aðrir. Eftir fundin bjóða vit kaffi. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Samkoman Malta
Vinkelvej 2
Hirtshals
tlf. 98944370

Evangeliska Røddin, Odense
Føroyska sendingin frá Odense Radio hoyrist hvønn mikudag kl. 16.40, danska tíð, á FM 107,1 MHz.

Malta, Hirtshals
Sunnudag: Kl. 11: Breyðbróting. Kl. 18: Evangeliskur fundur. Mikukvøld kl. 20: Bønar- og uppbyggingarmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin til hesi møti. Eftir fundirnar bjóða vit ein drekkamunn.

Eliaskirkjan
Møti er hvørt leygarkvøldið kl. 19 í kjallaranum í Eliaskirkjuni á Vesterbro Torv, Vesterbrogade 49. Inngongd undir stóru trappuni. 5 min. at ganga frá Hovedbanegården, 2 min. frá Føroyahúsinum. Bussarnir 1, 6, 14, 16, 28 og 550S steðga nærhendis. Sunnudagsskúli er í Eliaskirkjuni hvønn sunnudag kl. 14 í kjallaranum og kl. 11 í barnarúminum á Øyrasundskollegiinum, Dalslandsgade 8 á Amager. Øll eru vælkomin. Nærri fæst at vita frá Atla Rasmussen, tlf. 32969995 ella Róa Rasmussen tlf. 32886480. E-mail: ek_fo@get2net.dk

Pensionistafelagið í Havn
hevur fund í Losjuni, Tinghúsvegur 18, mikukvøldið 29. september kl. 19.00. Thorolf Bjørklund sigur frá.

Tilhaldið
í Tórsgøtu 21, tlf. 316491
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
Í vetur verður matgerð í Tilhaldinum undir kvøldskúlaskipanini hvønn miku- og fríggjadag frá kl. 10.-13.30 v/ Anne Grete Harlou, tilm. tlf. 316491
Hósdagin 30. september
kl. 10.00–10.30: Fimleikur, Sonja Danielsen.
kl. 10.30–12.00: Telduprát, Brandur Petersen.
kl. 14.00–16.00: Boccia í kjallaranum.
kl. 10-17 Opið hús
Fríggjadagin 1. oktober
kl. 10.00–13.30: Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12.00: Døguði, tilmelding mánadag á tlf. 316491.
kl. 13.00–17.00: Opið hús.
7. oktober kl. 11.00–11.45 verður byrjanarskeið í eingilskum talumáli. Tilmelding á tlf. 316491.

Í vetur verður matgerð í Tilhaldinum undir kvøldskúlaskipanini hvønn miku- og fríggjadag frá kl. 10.00-13.30

Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

Sunda pensionistafelag
Hugnakvøld verður í Eydnuni á Oyrarbakka mánakvøldið 4. oktober kl.19.00. Bussarnir koyra sum vanligt.
Nevndin

Tilhaldið Hugnin í Sandoy
hevur opið mánadag og mikudag frá kl 14 til 17. Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa. Bløðini eru eisini til taks.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

Daghilhaldið Fløvi
– í kvinnufelagshúsinum á Glyvrum. Tlf. 448279. Allir pensionistar eru hjartaliga vælkomnir. Opið mánadag til fríggjadag kl. 15-18.
Hósdagin 30. september:
Vit gera myndavevar.
Fríggjadagin 1. oktober:
Opið hús.
Vit baka pannukøkur og byrja at baka kl. 14.30.

Hvønn dag ein góður drekkamuður at fáa. Bløðini eru altíð til taks. Somuleiðis kort og spøl. Tú ert vælkomin at hava títt egna handarbeiði við. Andakt verður lisin hvønn dag.

Dagtilhaldið í Vági
er hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15 til 18. Øll eru vælkomin.

Vágs Pensionistafelag
Vágs Pensionistafelag – felagið fyri pensionistar í Suðuroyar sunnaru helvt – hevur límafund kl. 19.00 hvønn seinasta mánadag í hvørjum mánaða. Ymiskt áhugavert er á hvørjum fundi, har tú eisini fært drekkamunn við bollum og køkum. Fundirnir verða hildnir í hugnaligu hølunum hjá Vágs Matmødrafelag. Allir pensionistar og øll oman fyri 60 ár eru vælkomin.

HAVNAR BIO
Tlf. 31 19 56
www.bio.fo

Hósdagin 30.09. kl. 19[00]
Hósdagin 30.09. kl. 22[00]



Hósdagin 30.09. kl. 18[00]
Hósdagin 30.09. kl. 20[15]

Hósdagin 30.09. kl. 22[00]

Við danskari talu – Billettprísur: 55,- kr.
Hósdagin 30.09. kl. 16[00]

Við enskari talu og donskum teksti– Billettprísur: 55,- kr.
Hósdagin 30.09. kl. 17[30]
– Seinasta sýning

KOMANDI FILMUR

Billettprísur: 55,- kr. – Frumsýning
Fríggjadagin 01.10. kl. 17[00]
Fríggjadagin 01.10. kl. 19[00]